# A Kind of B á veg

**Nú mánadagin 16. mai kemur Bjarki Meitil til Føroya við bólkinum hjá sær A Kind Of B úr USA. Í løtuni er bólkurin á konsertferð í Italiu, har hann millum annað hevur spælt í Rom og Napoli**

KONSERT
*tíðindaskriv*

Bjarki Meitil møtti hinum limunum í A Kind of B á Berklee College of Music í Boston í USA, har Bjarki sjálvur júst hevur lokið prógv sum B.A. í tónleiki.

Hinir limirnir í bólkinum koma úr Italiu og Argentina. Tónleikurin, sum bólkurin spælir, er jazz, funk og rokkur.

Bjarki Meitil er annars best kendur í Føroyum sum trummuspælarin í vælumtókta rokkbólkinum Chase. Nú hevur Bjarki skift trummurnar út við bassin.

Í Føroyum skal A Kind of B millum annað spæla í Rex Culture Club fríggjadagin 20. mai, í Mentanarhúsinum Atlantis leygardagin 21. mai, og í Norðurlandahúsinum leygardagin 28. mai. Harumframt skal bólkurin spæla á skúlum kring landið.

Meiri fæst at vita um A Kind of B á heimasíðuni hjá teimum www.akindofb.tk


## Starvsfólk

Vit søknast eftir handverkara, ella arbeiðsmanni, M/K, at arbeiða við at liðugt viðgera (mála) vindeygu og hurðar. At byrja skjótast tilber.

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi starv
- tryggar arbeiðsumstøður
- gott arbeiðsumhvørvi

**Vit vænta av tær:**
- at tú ert ágrítin og nærlagdur
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð evni at tilrættaleggja arbeiðið
- at tú ert fyrikomandi og álítandi

**Løn:**
Løn verður sambært avtalu

Nærri fæst at vita við at venda sær til Fróða Hansen, tel. 22 36 56 ella Dánjal Paula Poulsen, tel. 21 27 89

Vatnsoyra Snikkaravirki pf.





FLOGFELAG FØROYA • SØRVÁGUR TEL 30 90 90 • reception@ff.fo www.ff.fo

Gistingartilboð: 250,- fyri hvønn í dupultkamari. Íroknað morgunmatarbuffét! 150,- eyka fyri einkultkamar

HOTEL VÁGAR



## Mb. HEIMDAL til sølu



Smíðaður 1919 av Elias Johansen, Tórshavn
Útróðrarbátur 5 A
Longd: 9,81 m
Breidd: 2,95 m.
Brt: 8,75
Nrt: 3,95
Maskina: Volvo Penta 125 hk.

Væl útgjørdur við naut. útgerð og fiskiamboðum.
Væl hildin og við fiskiloyvi.



Heri Mohr Mortensen
Tel.: 371648 / 221847
826 Trongisvágur



STARVSLÝSING

## Verkfrøðingur til vegadeildina

**Við hesum verður søkt eftir verkfrøðingi til vegadeildina hjá Landsverki at seta sum skjótast.**

**Rætta fólkinum kunnu vit bjóða eitt spennandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.**

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja og standa fyri:
- Gera ætlanir fyri trygdartiltøk
- Programmeringar, forkanningar, prosjektering og prosjektgransking
- Eftirlit við verkætlanum
- Myndugleikaumboðan

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir verkfrøðingi ella fólki við aðrari viðkomandi útbúgving og helst við royndum innan omanfyri nevndu virkisøki. Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, og rokna vit við, at viðkomandi er fyrikomandi, hevur góð samstarvsevni, dugir at skipa sítt arbeiðsøki og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum og er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt, eggja og ganga undan.

Viðkomandi skal eisini kunna tola at verða fluttur á aðra deild og fáa aðrar uppgávur, enn tær omanfyri nevndu.

**Setanarviðurskifti**
Tænastustaðið verður skrivstovan í Havn. Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) verður at senda til:
Landsverk
Postboks 78
110 Tórshavn

og skal verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 20. mai 2005. Merkið brævbjálvan "Verkfrøðingur til vegadeildina". Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Finnleifi Durrhuus, fd@lv.fo, leiðara av vegadeildini, ella Heina Eysturoy, he@lv.fo, á tel. 31 13 33.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*